# Fiskiloyvi – avgreiðslugjald – Kári P. Højgaard



BJØRN KALSØ
landsstýrismaður

**Ein seinasta roynd at greiða Kára P. Højgaard, løgtingsmanni, frá, hvussu og hví avgreiðslugjøldini fyri fiskiloyvi og avhending av fiskidøgum og kvotum eru ásett júst, sum tey eru**

Fari fyrst at takka fyri, at Kári P. Højgaard í grein síni í bløðunum undir yvirskriftini "Viðmerking til svar frá Bjørn Kalsø" nú viðgongur, at landsstýrrismaðurin í fiskivinnumálum í lóg hevur fingið heimild frá Løgtinginum at krevja inn avgreiðslugjøld fyri fiskiloyvi og avhending av fiskidøgum og kvotum. Nú verður, sum rætt er, einki nevnt um avgerðir, ið formelt stríða ímóti stýrisskipanarlógini og lógini um vinnuligan fiskiskap.

Soleiðis sum eg skilji viðmerkingina, viðvíkur ónøgdin hjá Kára P. Højgaard nú, at allir báta- og skipabólkar gjalda somu upphædd fyri somu tænastu. Hví so er, gjørdi eg eina roynd at greiða frá í fyrra svari mínum. "Avgjald ella eykaskatt". Hetta varð m.a gjørt við at lýsa nøkur dømi, fyri at ítøkiliggera **munin** á avgreiðslugjøldum og avgjøldum ella skatti.

Avgreiðslugjøld verða, sum Kári P. Højgaard nú eisini nevnir í síni viðmerking, kravd við hvørja avgreiðslu. Hetta verður gjørt uttan mun til, hvussu langt tíðarbilið er millum avgreiðslurnar. Góð dømi um hetta eru pass, koyrikort, nummarspjøldur á bilin, tá loyvi skal fáast frá djóralækna at flyta seyð í aðra oyggj (ikki flutningskostnað, sum Kári P. Højgaard sipar til, tá hann samanber seyðin og kúnna) og avgreiðslugjøld, sum peningastovnar krevja fyri teirra tænastur til kundan.

Fiskiloyvi verða sambært lóg útskrivað á hvørjum ári, tí verður avgreiðslugjald fyri fiskiloyvi eisini kravt árliga. Avgreiðslugjald fyri avhending av fiskidøgum og kvotum verður bert kravt, um ynski er um at flyta fiskidagar ella kvotur.

Enn einaferð fýlist Kári P. Højgaard á, at brúkari og politiska skipanin ikki eru hoyrd í sambandi við avgreiðslugjaldið. Í tí spurninginum eri eg als ikki samdur.

Gjaldið er ásett í kunngerð, sum hevur heimild í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Nevnda lóg er samtykt í Løgtinginum, sum er okkara hægsta politiska skipan.

Kunngerðin hevur verið til hoyringar í Fiskivinnuráðnum, ið er umboðað av brúkaranum. Kunnað verður somuleiðis um allar kunngerðir í landsstýrinum. Kann eisini endurtaka, at væntaðu inntøkurnar av nevnda avgreiðslugjaldi standa á samtyktu fíggjarlógini fyri 2006. Fíggjarlógin verður á hvørjum ári viðgjørd av Løgtingsins

Fíggjarnevnd, har Kári P. Højgaard **er limur,** og tí átti at kent til málið. Parturin av fíggjarlógini, sum umfatar fiskivinnumál verður eisini viðgjørdur av Løgtingsins Vinnunevnd. Og afturat hesum kann vísast á tríggjar viðgerðir á Føroya Løgtingi av fíggjarlógini.

Skal tó leggja afturat í hesum sambandi, at eitt er at verða hoyrdur, annað er at vera samdur.

Fari at enda við at svara spurninginum, ið Kári P. Højgaard nevnir høvuðsboðskapin í fyrra lesarabrævi sínum. Spurningurin er, *"Hvat skal útróðrarmaðurin í veruleikanum gjalda fyri?"*

**Kostnaður:**
Avgreiðslugjaldið fer til lønarkostnað, telefon, skrivstovuútgerð, el, hita og teldutænastur, ið standast av arbeiðinum at avgreiða fiskiloyvi og avhending av fiskidøgum og kvotum. Ein meting, sum er gjørd av Fiskivinnustovuni og Fiskiveiðieftirlitinum liggur sum grund fyri ásetanini. Eins og alt fíggjarlógaruppskotið byggir á metingar fyri tað komandi árið, so byggir hetta gjald sum sagt eisini á metingar av kostnaðinum. Veruliga kostnaðin kunna vit bert staðfesta, tá viðkomandi fíggjarár er endað. Tó skal eg viðmerkja, at henda avgreiðsla verður gjørd saman við øðrum uppgávum á stovninum og verður tí kostnaðurin av hesum ikki bókaður serskilt.

Árligi kostnaðurin tilsamans av hesi tænastu verður mettur til **662.500,- kr**.

**Inntøkur:**
Útrokningar, gjørdar í Fiskimálaráðnum, vísa, at 1.133 fiskiloyvir verða útskrivað komandi fiskiár, og mett verður, at 120 váttanir verða givnar í sambandi við avhending av fiskidøgum og kvotum. Tilsamans verður inntøkan av hesum harvið:

1.133 x 500,- kr.
= 566.500,- kr.
120 x 800,- kr.
= 96.000,- kr.

**Inntøka tilsamans:**
**662.500,- kr.**

# Fyrimyndarligt av einum almennum stovni

Johan Petersen

***Bjørn Kalsø og MRCC-Sjóbjargingarstøðin eiga rós uppiborið fyri at hava framt ISO-góðkenning av stovninum. Hetta átti at fingið aðrar almennar stovnar, eitt nú Landssjúkrahúsið og Kringvarpið at gjørt tað sama***

Um dagarnar frættist, at Sjóbjargingarstøðin, sum kom í rættuligt óðnarveður, tá ið Jøkulfelli gekk burtur norðan fyri Føroyar, hevði fingið ISO-góðkenning frá Norske Veritas. Hetta má sigast at verða eitt bæði klókt og framsíggið stig, sum er tikið, við tað at nú eru allar mannagongdir skrásettar og øll mistøk verða viðgjørd, eftirmett og rættað, uttan at nakar uttanfyristandandi nýtist at gera vart við tey. Og samstundis er støðin undir loypandi eftirliti av einum óvildigum stovni, sum tryggjar, at góðskan viðvarandi er á fyriskrivaða støðinum.

**Hvørt fiskavirki hevur slíka skipan**
Hetta er nakað, sum er kent í privata vinnulívinum, har t.d. øll fiskvirkir og fiskaútflytarar skulu hava eitt innaneftirlit, sum tryggjar keyparan, at hann fær ta góðsku, sum virkið sigur seg standa fyri.

**PISA-kanning**
Einasti almenni stovnur, sum áður hevur gjørt góðskumetingar, er Mentamálaráðið, sum lat gera eina PISA-kanning av føriska skúlaverkinum, uttan at hetta tó var at sammeta við eina ISO-góðkenning.

PISA-kanningin segði bert hvørjum støði, skúlaverkið er á, meðan ISO-góðkenningin tryggjar javnt góðskustøði, sum so kann betrast, um hugur er til tess.

**Almennir stovnar ynskja ikki at verð góðskumettir**
Tað tykist, sum um almennir stovnar ikki ynskja ella tora at fáa seg góðskumettar. Eitt fekst dømi er mótstøðan í skúlaverkinum um kapping frá privatskúlum.

Men nú hevur ein almennur stovnur torað at brotið upp úr nýggjum og hevur latið seg góðskumett av óheftum stovni og tað eigur stovnurin og landsstýrismaðurin, ið varðar av stovninum, Bjørn Kalsø, alt rós uppiborið fyri.

**Landssjúkrahúsið og Kringvarpið næstu?**
Vónandi er hetta bert byrjanin fyri eina almenna fyrisiting og stovnar, sum seta góðskuna í hásæti. Hví ikki fremja somu skipan fyri eitt nú Landssjúkrahúsið, sum vit øll hava so nógv fyri neyðini og sum júst nú eisini er í einum sonnum óðnarveðri? Og Kringvarpið, sum ávirkar okkum øll so ómetaliga nógv og sum í nógv ár hevur verið kritiserað fyri vánaligan journalistikk?

Slík skipan kundi endurreist álitið á hesar stovnar.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra mamma, vermamma og omma okkara

**Alvilda Heinesen**

Hósvík

andaðist á Korndalsbýlinum á Eiði leygarkvøldið
70 ára gomul

Jarðarferðin verður úr Hósvíkar kirkju mikudagin kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
***Jóhanna og Agnar***

Tey, ið vilja minnast Alvildu kunnu í staðin lata eina peningagávu til Korndalsbýlið á Eiði. Konta í peningastovnunum

# Tøkk

Hjartaliga vil eg takka øllum, sum mintust til mín á 75 ára degnum tann 10. juli.
Ein serlig tøkk til børnini við familju, sum gjørdu, at dagurin eydnaðist so væl.

**Kærastu heilsanir**
**Paula Gærdum, Strendur**



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin